## 5.000 mistu arbeiðið í januar

Arbeiðsloysið í Danmark veksur í hvørjum, og nýggj tøl vísa, at í januar mistu næstan 5.000 danir arbeiðið. Sostatt vóru 64.200 danir arbeiðsleysir um mánaðarskiftið, so nú er arbeiðsloysið komið upp á 2,3 prosent. Danska hagstovan sigur, at síðani seinasta summar hava meiri enn 17.000 fólk mist arbeiðið. Vøksturin hevur verið serliga stórur síðani í heyst, og teir seinastu tríggjar mánaðirnar hava í meðal 4.500 fólk mist arbeiðið um mánaðin. Hagstovan sigur, at heldur verandi gongd fram, verða 120.000 danir arbeiðsleysir, tá 2009 endar.



## RBS risastórt hall

Stóri bretski bankin Royal Bank of Scotland (RBS) hevði 24,1 milliardir pund í halli í 2008, og tað er størsta hall, sum nakað bretskt felag hevur havt nakrantíð, sigur BBC. RBS kunngjørdi sítt ársúrslit í morgun, og samstundis gjørdi leiðslan vart við, at bankin fer undir eina umskipan, sum millum annað ber í sær, at hann fer at selja fleiri ognir og leggja fleiri dóttirfeløg niður. Bretska stjó0rnin hevur longu hjálpt Royal Bank of Scotland við 20 milliardum pundum, og stjórnin ætlar harafturat at yvirtaka vánalig útlán fyri meiri enn 300 milliardir pund.

# Vit hava heimsins bestu

**– Vit hava bestu alarar í heiminum í dag, og tað eiga vit at vera ikki sørt errin av. Tað sigur Jóhan Dahl, landsstýrismaður í alimálum, sum heldur, at vit eiga at skera burtur av forðingunum í eigaraviðurskiftunum í vinnuni, ið hevur eina bjarta framtíð í Føroyum**

ALIVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

– Støðan í alivinnuni er góð. Sum øllum kunnugt hevði alivinnan sera truplar tíðir fyrst í hesari øldini – 2000 og 2001, tá alt fór á húsagang orsakað av sjúku. Men síðani tá hevur vinnan ment seg aftur, og í fjør kom hon upp á 29.000 tons í útflutningi, og sambært vinnuni sjálvari eru útlitini fyri í ár, at útflutningurin fer at toga upp móti 50.000 tonsum.

Tað sigur vinnumálaráðharrin, Jóhan Dahl, sum eisini umsitur alimál.

Hann sigur, at Føroyar sum aliland er nummar eitt í heiminum.

– Vit hava bestu alarar í heiminum í dag, og tað eiga vit at vera ikki sørt errin av. Vit hava eina eftirlitisskipan, sum aðrir hyggja at, og sum er ment av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni saman við Atlantstøkni, og tað er ein skipan sum í dag tryggjar, at tað ikki er ov nógvur fiskur í ringunum, hon vísir tøku, hon vísir fóður, sigur Jóhan Dahl.

Skipanin knýtir alarar saman, og er ein ógvuliga framkomin skipan, sum er til gagns fyri eftirlitsmyndugleikan og fyri vinnuna og alaran sjálvan.

– Eg haldi sjálvur, at alivinna í Føroyum er áhugaverd, bæði innan traditionella aling, sum er laksur og síl, men avgjørt eisini innan toskaaling, ið hevur víst seg at verið sera áhugaverd, bæði á sjógvi og landi, sigu Jóhan Dahl.

Føroyingar vóru við til eina ráðstevnu í Íslandi har tað kom fram, at úrslitini hjá føroyingum og tær umstøður vit ala og hava alt undir í Føroyum, hava víst seg at vera tey bestu yvirhøvur við hesum fiskasløgum.

– Tí haldi eg, at ein áhaldandi menning av teimum møguleikum, ið liggja í at ala tosk, eigur at stuðlast so ella so av landsins myndugleikum. Tað er jú ein kostnaðarmikil gongd hjá teimum, sum eru í hesari vinnuni at koma hartil, at vit kunnu tosa um eitt støði, har hon er burðardygg, sigur Jóhan Dahl.

Talan er eisini um at koma yvir tær barnasjúkur, sum altíð eru við nýggjum tiltøkum, tað verið seg útgerð, fóður og so framvegis.

– So er politiskur meiriluti fyri at fáa eitt vinnuligt bein at standa á aftrat – og tað vilja vit avgjørt – so haldi eg eisini at vit eiga at skapa teir karmarnar, sum skulu til fyri at vinnan kann blíva til tað, sum vit vilja hava hana til, sigur Jóhan Dahl.

### Raðfesta aling

Hann vísir á, at onnur lond eru við til at menna vinnur, við at veita fasilitetir av ymsum slag.

– Vit kundu kanska verið við til at ment toskaaling á landi, við eitt nú at gjørt uttanumhvørvið í ordan og kanska veitt fasilitetir at alt í, og so kundu alarar sjálvir útvegað fisk og rikið royndaralingina. Vit kundu skapt karmar at ment eina nýggja vinnu, sigur Jóhan Dahl.

Hann vísir á, at ein slík nýggj vinna er dýr at menna.

– Tú fær ongan inn í hesa vinnuna við nógvum pengum, uttan at teir síggja, at hetta eisini er eitt ynski frá politiska myndugleikanum, og at hann bakkar verkætlanina upp, sigur landsstýrismaðurin við alimálum.

Og tað heldur hann sum sagt, at landið eigur at gera, so hann vónar at alivinan generelt, bæði innan laks og síl og tosk, fer at verða ein stór vinna.

– Tað er einki at taka seg aftur í, at heiminum manglar mat og kemur í stóran mun at liva av aldum vørum, eisini úr sjónum, frameftir, og tað verður ein størri og størri partur av tí, vit konsumera, sum verður fiskaføði frá alifiski. Og har eiga vit avgjørt sum samfelag at verða ein av teimum stóru viðspælarunum innan fyri tey øki, ið vit nú einaferð kunnu menna okkum í, sum serliga er laksur og toskur og tað, vit annars í okkara umhvørvi kunnu menna, sigur Jóhan Dahl.

Landsstýrismaðurin við alimálum sær tí eina ljósa framtíð fyri alivinnuna, megna vit at halda hana fría fyri sjúkum.

Eitt av teimum samstarvsøkjunum, sum sitandi samgonga hevur fest á blað er júst at fáa ment alivinnuna, bæði innan fyri fóður – sum Havsbrún jú megnar ógvuliga væl – og innan fyri biotøkniliga partin, ella genetiska partin, fyri at tryggja sær, hvussu hann kann mennast. Men eisini hvussu best møguligu karmarnir verða skaptir fyri vinnuna.

– Nakað krónutal er ikki ásett í hesum sambandi, men vit kunnu stuðla á mangar mátar, millum annað við at hjálpa til við fasilitetum um neyðugt. Tað hevur í hvussu er eina høga raðfesting at fáa hesa vinnuna at gerast eitt stórt og trygt bein at standa á, saman við verandi fiskivinnum í Føroyum og øðrum vinnum sum KT-vinnuni, sigur Jóhan Dahl.

### Kynbótaarbeiði

Eitt øki, sum tað í sínari tíð varð lagdur stórur dentur á í sambandi við aling, er kynbótaarbeiðið, sum nógv varð gjørt burtur úr á Lívfiskastøðini í Skopun. Hetta arbeiðið varð tó niðurlagt fyri einum 5-6 árum síðani. Hvørjar eru so vónirnar fyri, kynbótaarbeiðið verður tikið uppaftur?

– Ja, hattar er ein góður spurningur, tí útmeldingarnar frá vinnuni og frá Fiskaaling eru, at tað nú er hildið uppat við kynbótaarbeiðinum á Lívfiskastøðini í Skopun, og grundgevingin er hon, at tá tað varð gjørt frítt at keypa rogn frá øðrum londum, fekst eisini ein slík góðska, sum fult út stóð mát við tað, vit kundu framleiða í Føroyum, sigur Jóhan Dahl.

Hetta var so orsøkin til, at marknaðurin varð latin upp, men tað er heldur ikki bara gott við hesum.

– Eg havi skilt, at eitt nú í Noregi hava teir stríðst við sjúku í rognafiskinum, og tí er tað eisini ein ógvuliga umráðandi spurningur hjá okkum sum myndugleika, eins og hjá vinnuni sjálvari, og hjá Havbúnaðarfelagnum, sum umboðar vinnuna, at endurskoða hatta kjakið, sum eg meti ikki er liðugt enn. Serliga tá tað, sum hendir í løtuni, verður havt í huga, sigur Jóhan Dahl.

Hann sigur, at tað er



*Stóð tað til landsstýrismannin í alimálum, varð slept púra leyst hvat eigaraviðurskiftunum í alivinnuni viðvíkur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*